## Dystir um vikuskiftið

**FORMULA-DEILDIN**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 30.04 | ÍF-VB/S | Eiler Rasmussen |
| 30.04 | EB/S-Skála | Petur Reinert |
| 30.04 | GÍ-NSÍ | Jens Petur Brattalíð |
| 30.04 | B68-KÍ | Páll Augustinussen |

**1. DEILD**

| | | |
|---|---|---|
| 29.04 | B71-SÍ | Ransin N. Djurhuus |
| 29.04 | KÍ-VB/S | Rúni Gaardbo |
| 29.04 | TB-FSV04 | Jónleif Frederiksen |
| 29.04 | HB-AB | Jóannes Mikkelsen |
| 29.04 | LÍF-Royn | Jón Sigurð Gleðisheygg |

**2. DEILD**

| | | |
|---|---|---|
| 30.04 | B36-GÍ | Laurits í Króki |
| 30.04 | Skála-NSÍ | Bárður Mortensen |
| 30.04 | EB/S-ÍF | Jan á Líðarenda |
| 30.04 | Fram-B68 | Bergleif Sólsker |
| 30.04 | MB-KÍ | Hentza Johansen |

**1. DEILD KVINNUR**

| | | |
|---|---|---|
| 30.04 | EB/S-KÍ | Høgni Hansen |
| 30.04 | B36-AB | Ransin N. Djurhuus |
| 30.04 | HB-GÍ | John S. Jacobsen |
| 30.04 | SÍ-NSÍ | FSV04/SÍF |

**ATLANTIC CUP**

| | | |
|---|---|---|
| 29.04 | B36-FH | Dagfinn Olsen |

# Botnliðini vilja hava stig

**Kravið hjá bæði ÍF og VB/Sumba er púrasta einfalt. Stig - og helst trý av slagnum - skulu á kontina sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir fimm umfør av Formula-deildini eru bæði ÍF og VB/Sumba í akuttum vanda fyri at verða heilt afturúrsigld. Enn hevur hvørgin parturin fingið stig á kontina, og við fimm stigum upp til áttanda plássið er tørvurin heilt skjótt um at gerast ovurhonds stórur.

Tað eru spælarar í báðum legum eisini fullgreiðir um, og tað tykist eisini, sum leggja partarnir nógv fyri.

### Nógv ivamál

Serstakliga hjá ÍF er líkt til, at menn verða neyðturvuliga pjøssaðir saman, soleiðis at uppstillingin kann verða tann sterkasta møguliga. Hóast árið er ungt, so hava skaðarnir mest sum rapað oman yvir fuglfirðingarnar, og í øllum førunum tykist talan vera um spælarar, sum eiga mest sum fast pláss millum teir fyrstu ellivu.

Einasti spælarin, sum tó heilt víst ikki verður við sunnudagin, er Símun Eliasen. Hann hevur annars roynt at vant í vikuni, men enn gevur brotni armurin nakað av pínu, og so er vónleyst at spæla.

Hartil hava Alexandar Jovevic, Hanus Eliasen, Arnold Joensen og Fritleif í Lambanum allir drigist við skaðar. Men vónin er, at teir kunnu vera við, tá liðið fer á vøllin sunnudagin.

### Vilja fáa mistøk burtur

Hjá VB/Sumba er støðan við fólki nakað væl betri. Í mun til undanfarnu dystirnar, so er litaviski Dalius ikki við á liðnum, nú sáttmálin við hann er settur úr gildi. Hinvegin vóna tey í VB, at tað ber til at fáa spæliloyvið hjá danska Kristian Solberg í rættlag undan vikuskiftinum, soleiðis at hann kann styrkja um verjupartin.

Júst verjuparturin er eisini tað, sum venjarin, Ole Andersen, tykist leggja størsta dentin á.

– Spælið hjá okkum hevur als ikki verið so galið seinastu dystirnar, og í Klaksvík var eg sum so sera væl nøgdur. Men vit fremja nøkur dýr mistøk í verjupartinum, og tey verða vit revsaðir fyri. Fáa vit beint hesi burtur, so ivist eg ikki í, at tað fer at koma betri glið á hjá okkum, og vit fara sjálvandi eftir einum sigri sunnudagin, staðfestir hann.



*Spenningurin er stórur undan dystinum ímillum tey bæði botnliðini, ÍF og VB/Sumba, sum ikki hava fingið stig í teimum fyrstu fimm dystunum*

# Sorin og Ronnie í klønum tráði

**Bæði á Skála og á Eiði tykist saknur skula vera í lyklaspælarum í grannauppgerðini, sum plagar at vera eyðkend av at vera málfátøk**

EB/STREYMUR-SKÁLA
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Skála fer sunnudagin at vitja á Mølini. Hetta verður sætta ferðin, at henda grannauppgerðin verður. Um úrslitini av undanfarnu ferðunum verða nýtt sum grundarlag, so verður talan um fá mál sunnudagin. Skála hevur fimm ferðir spælt á Eiði. Liðini hava vunnið tveir dystir í part, og eina ferð hevur verið málleysur javnleikur. Málmunurin er 2-2, og tað er ikki enn komið fyri, at meiri enn eitt mál er komið í hesum uppgerðunum.

Í EB/Streymi hava Fróði Clementsen og Knút Vesturtún verið burturi við skaðum. Teir venja aftur við fullari ferð. Sorin Anghel noyddist sunnudagin at fara av vøllinum í Runavík beinanvegin eftir steðgin. Hann hevði koykt fótin illa, og Sorin hevur ikki vant saman við hinum í hesi vikuni.

Hóskvøldið noyddist Ronnie Samuelsen at gevast at venja orsaka av skaða. Fyrrapartin í dag vóru teir í EB/Streymi ivasamir, um miðvallarspælarin fór at verða førur fyri at spæla í morgin, og teir dugdu einki at siga um, hvussu tað verður við Sorini, sum fær nógva viðgerð. Teitur Joensen hevur higartil í ár verið uttarlaga í hópinum. Mikukvøldið styrkti hann ivaleyst um sína støðu, tá ið hann í fyrsta landskappingardystinum hjá næstbesta liðnum skoraði tvey mál. Tað var móti B68, sum EB/Streymur vann 3-2 á.

### Fleiri mangla

Skála fekk fult aðru ferð á Eiði í fjør, og hin dysturin endaði málleysur. Fótbóltsspælið plagar ikki at vera nakað serligt í hesum uppgerðunum, men intensitetinum hevur einki bilað.

Pauli G. Hansen og Alexandur Johansen eru framvegis skaddir. Tað er Borgar Kristiansen eisini. Levi Hanssen er leikbannaður. Jónhard Frederiksberg hevur ikki vant saman við hinum í vikuni, men teir vóna, at hann verður førur fyri at spæla sunnudagin. Evni til teir fyrstu ellivu eru Debus Danielsen og Poul N. Poulsen.

Tað er ikki so nógv nytta í tí her og nú. Men á Skála fegnast teir um, at Arnhold Berg eftir krossbandsskurðviðgerð í fjør heyst er farin at venja aftur, og at tað sær út til, at Sveinur Justinussen eftir knæskaða skjótt kann fara at venja aftur.